# Vesturvón 25 milliónir í lastini

*Seinnapartin leygardagin kom Vesturvón aftur á Sørvág eftir at hava verið til fiskiskap í ein dag undir fýra mánaðar*



»Vesturvón« leggur at bryggju í Sørvági. So tungur hevur hann ikki verið seinastu tvey árini



*Her tekur abbadóttirin ímóti Heðini Hansen, skipara á »Vesturvón«. Aftanfyri sæst reiðarin, Ólavur Petersen*

ORÐ OG MYNDIR:
ÓLAVUR Í BEITI

Flakatrolarin hevur roynt í norskum og russiskum sjógvi, og sum skilst hevur fiskiskapurin verið javnt góður.

»Vesturvón« hevur longu fiskað sína kvotu eystanfyri, og nú verður arbeitt við onkrum møguleikum til restina av árinum, men enn er ikki endalig støða tikin til, hvat tað verður. Ólavur Petersen, reiðari, sigur við Internet-Sosialin, at nakrir møguleikar verða kannaðir, umframt at fara á svartkalvaveiði við Flemmish Kap í oktober.

Skipari á hesum túrinum var Heðin Hansen, sum ikki áður hevur verið skipari á »Vesturvón«, tó at hann hevur siglt hjá reiðarínum í eini 25 ár. Seinastu 10 árini hevur Heðin Hansen verið stýrimaður á »Vesturvón«, og nú hann gjørdist skipari á fyrsta túrinum, kundi hann eisini halda sín 40 ára føðingardag umborð.

Hetta hevur verið ein av góðu túrunum hjá »Vesturvón«, og verður lastin mett til 724 tons í flaki. Prísurin er eisini støðugur í løtuni, so reiðarin Ólavur Petersen roknar við at flakatrolarin »Vesturvón« hevur fiskað fyri góðar 25 milliónir krónur henda túrin.

Týsdagin verður farið til Hirtshals at leggja veiðina upp, og eisini skal »Vesturvón« í dokk, har millum annað maskinan skal reinsast.

# Eiga at finna semju um sjálvstýri

*Tað er ein politisk uppgáva at finna eina semju um føroyskt sjálvstýri, sum fólkið tekur undir við, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum*

EYÐUN KLAKSTEIN

– Ynskið um føroyskt sjálvstýri og ynski um føroyskt sjálvbjargni kann gerast ein fólkasøk, um vit gera okkum tann ómak og taka ta tíð, sum tað tekur til at finna eina semju.

Hetta segði formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, í røðu síni, tá løgmansrøðan var til viðgerðar á tingið í farnu viku.



*– Fullveldið er ynskið hjá einum minniluta, segði Jóannes Eidesgaard undir tingviðgerðini av løgmansrøðuni í farnu viku*

Hann segði, at alla aðrastaðni botna sjálvstýrisrørslurnar í einum ynski frá fólkinum sjálvum – sjálvstýrið er einki politiskt uppfinnilsi – og tað er fólksins stríð. Men soleiðis er ikki í Føroyum.

– Alt meira bendir á, at avgerðin um føroyskan sjálvstýrispolitikk er løgd í hendurnar á nøkrum fáum útvaldum føroyingum at gera av, og tað sum er verri, hon er samstundis løgd í hendurnar á einari danskari stjórn at gera av, segði Jóannes Eidesgaard.

### Minniluti ynskir fullveldi

Formaður Javnaðarfloksins helt, at tað er ein sera mannminkandi støða, tí ein sjálvstýrisrørsla eigur at verða borin uppi av stoltum hugsanum um egnar møguleikar og egin evni.

– Fullveldið er ynskið hjá einum minniluta, tí var talan um eina fólkasøk, hevði tað í sjálvum sær givið landsstýrinum ta neyðugu styrkina, sum skal til fyri at náa málinum, segði Jóannes Eidesgaard.

### Bjóða sjálvsstýrisuppskot fram

Hann helt, at ynski um føroyskt sjálvstýri og sjálvbjargni kann gerast eina fólkasøk, um landsstýrið broytir kós, og heldur fer at royna at finna eina semju, sum fólkið kann taka undir við.

– Hendan semjan er hvørki føroyskt fullveldi við danskari vælvild ella føroyskt fullveldi við donskum smásinni. Og hendan semjan er eitur heldur ikki okkurt hissini nýskipanaruppskot, sum ber hevur onkrar smáar broytingar av verandi heimastýrislóg.

– Hendan semjan liggur eitt ella annað stað millum uppskot landsstýrisins um fullveldi og uppskotið hjá Sambandsflokkinum til nakrar varligar justeringar av verandi skipan. Og her er tað, at vit bjóða okkara uppskot til eina sjálvsstýrislóg fram, segði Jóannes Eidesgaard.

# Posturin í stríð við stýrisskipanina

*Ivi hevur stungið seg upp um ætlaðu broytingina av Postverki Føroya. Vinnumálastýrið kannar nú, um ætlanin er í stríð við stýrisskipanarlógina, soleiðis sum onkrir løgfrøðingar vilja vera við*

EYÐUN KLAKSTEIN

Vinnumálastýrið kannar nú, um ætlanin at broyta Postverk Føroya stríðir ímóti stýrisskipanarlógini.

Hetta verður gjørt, eftir at onkrir løgfrøðingar hava víst á trupulleikan, sum er við umskipanini av Postverkinum.

– Løgfrøðingarnir eru ikki samdir um málið, og tí vilja tryggja okkum, at alt er í lagi, tá uppskotið verður lagt fyri tingið, sigur Finnbogi Arge, landsstýrismaður við vinnumálum.

Ætlanin er at gera ein skipan fyri postflutning sum líkist teirru donsku skipanini, sum Post Danmark virkar eftir. Hetta er ein skipan, sum liggur onkrastaðni á leiðini millum ein almennan stovn og eitt alment partafelag.

Trupulleikin er so, um broytta Postverkið kann virka undir teimum útgjaldsheimildum, sum stýrisskipanin ásetur.

– Spurningurin er, um Postverkið er innanfyri ella uttanfyri fíggjarlógina við nýggju skipanini. Var tað eitt alment partafelag, so var eingin ivi, men við hesi serligu skipanini er tað meira ivasamt, sigur Finnbogi Arge.

### Fyrsta stigið á leiðini

Tá Postverk Føroya kom í stórar gjaldføristrupulleikar fyrr í ár, avgjørdi landsstýrið, at ein loysn mátti finnast á trupulleikunum hjá Postverkinum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum var sinnaður at gera Postverkið til eitt alment partafelag, men hesum fekst ikki undirtøka fyri í landsstýrinum.

Ístaðin varð ein semja gjørd um at royna eina líknandi skipan, sum Post Danmark virkar eftir. Hetta er ein serlig skipan, sum bara verður brúkt á postøkinum í Danmark, men sum á onkran hátt minnir um eitt partafelag.

### Uppskotið seinkað

Í Føroyum er ætlanin at seta eina nevnd at stýra Postverkinum, og nevndin skal royna nýggju skipanina í trý ár og síðani taka støðu til, hvussu Postverkið skal skipast í framtíðini.

Í løgmansrøðuni í ár stendur, at hetta er fyrsta stigið til at skipa Postverk Føroya sum eina sjálvstøðuga almenna fyritøku, sum seinni kann verða skipað sum eitt partafelag. Undirtøka fæst tó neyvan fyri hesum í verðandi samgongu.

Finnbogi Arge, landsstýrismaður, ætlaði at leggja uppskotið um Postverkið fyri løgtingið í heyst, men málið er nakað seinkað av ivanum, sum hevur stungið seg upp um stýrisskipanarlógina.



# Færri føroyskar bókaútgávur

*Samlaða talið á føroyskum bókaútgávum í fjør var nakað væl lægri enn árið frammanundan.*



RÚNAR REISTRUP

121 føroyskar bøkur vórðu givnar út í 1999, og hóast tær illa kunnu leggjast undir at vera fáar í tali hetta árið, so vóru føroysku bókaútgávurnar árið fyri væl fleiri.

Tá taldust tær føroysku bókaútgávurnar 157.

Millum annað hetta stendur at lesa í júst útkomnu ársfrágreiðingini fyri árini 1998 og 1999 hjá Føroya Landsbókasavni.

Av tølunum fyri tey bæði árini 1998 og 1999 sæst, at tað serliga er talið á barna- og ungdómsbókum, sum er minkað. Í 1998 vórðu givnar 54 bøkur út í hesum temabólki, men í fjør var talið helvtina minni. Skúlabøkurnar eru eisini umleið helvtina færri.

Hinvegin er talið á føroyskum yrkisbókmentum vaksið.

Av teimum 121 føroysku bókunum, ið komu út, vóru 37 týðingar og 84 upprunaverk. Við at samanbera við tølini árið fyri sæst, at tað serliga er innan týðingar, at talið á føroyskum bókaútgávum er fallið.

Síðan fyrsta føroyska bókin kom út í 1822 vóru við árslok 1999 útgivnar 3.882 føroyskar bøkur.

### Nógv prentað í Føroyum

Meira enn helmingurin av føroysku bókaútgávunum í fjør, vórðu prentaðar í Føroyum. Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Landsbókasavni verður gongdin á hesum øki lýst ígjøgnum tey farnu tíggju árini.

Her sæst, at ein stór broyting er farin fram við tað at fyri tíggju árum síðan var bert umleið fimta hvør føroyska bók prentað í Føroyum.

Í ársfrágreiðingini nýtir leiðarin á Føroya Landsbókasavni, Martin Næs, annars høvið at finnast heldur hvassliga viðgerðini, ið bókasavnslógin frá 1988 fekk í kommunuálitinum, sum varð handað landsstýrismanninum í kommunumálum í 1998.

Her verður ført fram, at bókasavnslógin er ov framasøkin, og at hon tískil átti at verið broytt.

Framasøkin er føroyska orðið fyri ambitiøs.

At leiðarin á Føroya Landsbókasvanið heldur lítið um hesa niðurstøðu, framgongur av oddagreinini í ársfrágreiðingini hjá stovninum.


## Skrivstovufólk-menningarmøguleikar

Søkt verður eftir fólki til skrivstovu okkara á Toftum. Arbeiðið umfatar logistikk, bókhald og aðrar fyrifallandi uppgávur. Ætlanin við starvinum er, at viðkomandi innanfyri stutta tíð skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hjálpa til við innkeypi av rávørum.

Viðkomandi hevur stórar møguleikar at mennast innanfyri yrki og skal við tíðini sjálv/ur leggja arbeiðið til rættis. Lønin er kappingarfør og hækkar við ábyrgdini hjá viðkomandi.

Umsøkjarin skal hava drúgvar royndir innanfyri skrivstovuyrki. Viðkomandi skal vera nærløgd/nærlagdur og passa inn í eitt umhvørvi eyðkent við óformligum samverutóna.

Umsøknin skal sendast til Valhalla innan 15. august. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Peter vognsen Nørgaard, stjóra.

Valhalla
supplier of seafood

Valhalla P/F • Niðara Gøta 76 • 188 Hoyvík, Faroe Island • P/F reg. nr. 2900
Tel. +298 321880 • Fax +298 321890 • E-mail: valhalla@post.olivant.fo

Valhalla er ein nýggj fyritøka sum varð stovnað í 1999 við adressu í Hoyvík. Nýggj framleiðsluhøll við skrivstovu er á Toftum. Fyritøkan í Føroyum framleiðir og selur feskar fiskavørur sum seljast til nógvar minni kundar innanfyri EU.


# Tekstur í bland

Í røðu hjá Frits Johannesen úr Fuglafirði, sum vit prentaðu í fríggjadagsblaðnum komu nakrar reglur í bland og ein misskiljing um hvat í røðan varð hildin. Gøtustevnan varð hildin í Norðagøtu og yrkingin »Og løtan, hin signaða ríka.« ljóðar soleiðis í rættari raðfylgju.

Og løtan, hin signaða ríka,
á kvirru ástheitu nátt
á lat meg í kossinum doyggja,
tá hvíli eg æviga gott.

Tíðin legg tínar veingir saman,
bert hesa stund,
meðan eg sælur kyssi
mítt sólfagra ástarsprund.

Poul F. Joensen


